FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Úr naggatódn til loysnir

**Jóannes Eidesgaard**
*fólkatingsmaður*



Tað er rætt, tá Lisbeth Petersen sigur, at tað bert eru tveir flokkar, sum hava eitt einfalt svar til ríkisrættarliga spurninginum. Sambandsflokkurin hevur síðan 1906 sagt nei, og tað merkir, at alt bert skal vera júst, sum tað er. Tjóðveldisflokkurin hevur síðan 1948 sagt ja, nú skal loysast, men tíbetur eingin loysing. Eitt ja ella eitt nei má tí sigast at vera einføld svar, men tó als ikke vegur til nakra loysn. Eitt ja ella eitt nei heldur verandi støðu fasta.

Hesir báðir báðir flokkar halda í veruleikanum lív í hvørjum øðrum og eru bestu garantar fyri, at eingin loysn verður funnin á ríkissrættarligu støðuni. Fastlæsta støðan hjá Sambandsflokkinum, serliga valskeiðið 94 til 98, gjørdi, at Tjóðveldisflokkurin fekk eyka vind í seglini. Tí ber til at siga, at besti stuðul fyri loysingarvongin er ein sterkur Sambandsflokkurin.

Men verður ríkisrættarliga málið loyst einaferð med alla, so hava hesir mótpolar knappliga einki at stríðast fyri, og tí hava teir ein ávísan áhuga í at halda lív í kjakinum um loysing ella samband.

Eitt týdningarmikið mál í komandi valskeiði verður at fáa hetta málið loyst og lagt afturum okkum, so vit sleppa í holt við tey veruliga málini, sum bíða eftur okkum, og sum hava verið forsømd nú í skjóttt 4 ár. Og henda loysn, sum kann savna ein breiðan meiriluta á tingi og millum manna eitur sjálvstýri innan ríkisfelagsskapin. Loysnin eitur hvørki loysing, ella at einki skal henda, tað mugu vit gera okkum púra greitt. Og um onkur heldur, at ríkisrættarliga málið er svart ella hvítt, ella at Sambandsflokkurin ella Tjóðveldisflokkurin sita inni við loysnini, so er tað ikki rætt. Verður Sambandsflokkurin nóg stórur, so hendur einki, tað vita vit av royndum. Verður hin vegin Tjóðveldisflokkurin ov stórur, so hendir heldur einki, tí eingin annar flokkur vil fylgja honum til at loysa her og nú.

Ríkisrættaliga loysnin liggur mitt millum hesar báðar flokkar. Realistiska loysnin er also hvørki svørt ella hvít. Og júst hesa loysn kann sjálvstýrislógin verða grundarlag fyri, og eg kenni meg sannførdan um, at henda verður loysnin í seinasta enda.

Ein skilir partvís reaksjónina hjá teimum mongu, sum ræðast loysinga og fullveldið, at tey fara so langt yvir í mótsatta borð, at tey fara í sambandsgrøvina. Tey fara so langt, sum tey sleppa. Tað eru kanska nógv, sum halda, at hetta er ein heilgardering. Men soleiðis er tað nú einaferð ikki. Tað sum er umráðandi er, at vit fáa sett alternativið upp móti loysingini, og alternativið er ein loysn, sum er sjálvstýri innan ríkisfelagsskapin, sum Javnaðarflokkurin umboðar.

Vit mugu gera okkum greitt, at broytingina sleppa vit ikki undan, Tíðin krevur broyting, og broytingin loysir málið.

Lat okkum tú sláa kalt vatn í blóðið og velja flokkin, sum vil hava loysnir. Lat okkum for Guds skyld fáa lagt hetta málið afturum okkum, so vit sleppa at viðgera veruliga politikk bæði á Løgtingi og í Tinganesi. Lat okkum velja ta savnandi loysnina.

# Sjálvstýrislógin er tann savnandi loysnin í sjálvstýrismálinum

**- vinna veingirnir báðumegin, kemur onki annað burturúr enn framhaldandi og úrslitaleyst klandur og stríð**

**Hans Pauli Strøm**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



Uttan mun til hvar fólk standa í sjálvstýrismálinum, so eru tey flestu óivað leidd og troytt av tí áhaldandi og úrslitaleysa klandrinum og eljustríðnum fyri og ímóti fullveldi, sum hevur troðkað alt annað til viks nú í 4 ár. Tí er tað av størsta týdningi, at vit skjótt koma fram til eina semju í hesum máli, sum ein avgjørdur meiriluti í fólkinum kann taka undir við. So at vit kunnu leggja hetta afturum, og kunnu nýta alla orku til øll hini týdningarmiklu politisku samfelagsmálini, sum hava ligið á láni.

Men hesi farnu 4 árini hava prógvað til fulnar, at vit fáa onga loysn í sjálvstýrismálinum, uttan at tað verður ein semjuloysn, sum røkkur tvørturum miðjuna. Men tjóðveldisloysnin røkkur ikki yvir um miðjuna, tí Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fara ikki taka undir við loysingini. Sambandsloysnin røkkur heldur ikki yvir um miðjuna, tí hvørki Fólkaflokkurin ella Sjálvstýrisflokkurin kunnu góðtaka eitt nýskipanaruppskot, ið bert verður ein heimastýrislóg í nýggjum hami. Tí skulu aðrar loysnir til, sum kunnu fáa so mikið stóran stuðul frá báðum síðum aftan fyri seg, at tað verður ein stórur breiður meiriluti, bæði í tinginum og í fólkinum.

Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin hava latið seg sum uppgávukonur í føvningin á Tjóðveldisflokkinum, so har er onki at heinta. Javnaðarflokkurin hevur tí einasta alternativið, sum stendur eftir, nevnliga Sjálvstýrislógina sum ta einastu politisku loysnina, íð kann savna ein meiriluta aftan fyri seg frá báðum síðum.

Sjálvstýrislógin, í stuttum:

- Viðurskiftini millum Føroyar og Danmark verða ásett í einum sáttmála landanna millum, ið skipar londini sum javnbjóðis partar í ríkisfelagsskapi hvørt við annað.
- Sáttmálin, sum eisini staðfestir sjálvsavgerðarrættin, verður fráboðaður altjóða myndugleikum og fær harvið altjóðarættarligt gildi.
- Sáttmálin er grundarlagið undir eini Sjálvstýrislóg, sum kemur ístaðin fyri Heimastýrislógina, og sum ásetir:
- at øll málsøki kunnu yvirtakast og koma undir føroyskt lóggávuvald, tá Løgtingið ynskir tað, og
- at Løgtingið sum umboð fyri Føroya fólk er hægsti myndugleiki og harvið evsta vald í øllum málum, sum eru yvirtikin og løgd undir føroyskt lóggávuvald.

Við støði í Sjálvstýrislógini ber til at finna eina semjuloysn, sum umframt Javnaðarflokkurin eisini Sambandsflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Fólkaflokkurin kunnu taka undir við. Hetta er tann savnandi møguleikin. Annar møguleiki er neyvan.

# Hvønn leiklut skal okkara umboð á fólkatingi hava ?

**Edmund Joensen**



Sambært ríkisgrundlógina eiga Føroyar tvey umboð á fólkatingi, umboð við fullum rætti, eisini í donskum innlendis viðurskiftum.

Fólkatingið er felags lóggávutingið hjá øllum ríkisborgarum, eisini hjá føroyingum í ikki yvirtiknum málum. Ì yvirtiknum málum lóggeva føroyingar og grønlendingar sjálvir á Føroya Løgtingi og í Grønlendska Landstinginum.

Tað liggur í skipanini, at so hvørt sum londini átaka sær størri skyldur, so verður lógarøkið flutt úr fólkatinginum til løgting og landsting - og tað gongur bara ein veg.

Tí virkar tað órímuligt, um føroyingar og grønlendingar leggja seg út í, og fremja beinleiðis broytingar í donsk innlendis viðurskifti, sum ikki hava ávirkan á okkum. Hetta er ein vanvirðing av skipanini og ein vanvirðing av dønum.

Tað er tí forkastuligt, tá valevnini fyri Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin boða frá, at tey ætla at leggja seg út í danskan innlendis politikk. Hetta kan bara takast sum enn ein roynd at gera seg inná skipanina, ella at gera enda á skipanini innanífrá .

Ongin skipan er betur enn tey fólkini sum skulu umsita hana gera hana til. Vit kunnu hyggja at okkara egnu stýriskipanarlóg, hvussu hon er viðfarin undir hesum landstýrinum. Dømini tróta ikki.

Eitt sambandsumboð fer á fólkatingi av øllum alvi at virka fyri betran av viðurskiftunum, bæði hjá føroyingum í Føroyum og føroyingum í Danmark. Vit fara eisini at royna at byggja upp aftur tað sum er brotið niður í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark

Men vit fara ikki at leggja okkum beinleiðis út í danskan innlendis politikk, fyri at fremja broytingar í málum, sum bert viðkoma dønum, sum t.d. skatta- og avgjaldsviðurskifti og annað.

Líka lítið sum vit vilja hava danir at blanda seg uppí okkara innlendis viðurskifti, líka lítið skulu vit blanda okkum uppí burturav donsk innlendis viðurskifti.

Til dømis hevur støða Sambandsfloksins altíð verið, at okkara umboð ikki vildi fella eina danska stjórn. Hetta vildi verið at havt ov lítla virðing fyri sjálvari skipanini.

Hinvegin fer umboð Sambandsfloksins framhaldandi at samstarva við flokkin Venstre sum limur í teirra tingbólki.

À tann hátt fáa vit alla neyðug informatión og nógv stórri beinleiðis ávirkan á politiska arbeiðið í síni heild. Vit fáa møguleika at gerast limir í fólkatingsnevndum, sum viðgera mál av serligum føroyskum áhuga.

Vit fara at luttaka í fólkatingsarbeiðnum við tí frælsi og tí virðing, sum Sambandsflokkurin altíð hevur havt fyri politisku skipanini, og sum er ein treyt fyri fruktagóðum samarbeiði.




## Fólkatingsvalið

Til fólkatingsvalið, sum verður 20. november 2001, verða valkort send øllum veljarum í kommununi.

Um onkur, sum heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal viðkomandi siga frá hesum á kommunuskrivstovuni í seinasta lagi fríggjadagin 16. november 2001, kl. 13.00.

Veljarar í Hvalvíkar kommunu, sum sambært vallógini lúka tyreytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni, í seinasta lagi leygardagin 17. november 2001.

Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðið, og sum ynskja at greiða brævatkvøðu heima, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 422350 í seinasta lagi leygardagin 17. november 2001.

Valið fyri veljarar í Hvalvíkar kommunu fer fram í skúlanum týsdagin 20. november. Atkvøðugreiðslan fer fram frá kl. 09.00 til kl. 20.00, ella til støðgur kemur í eftir kl. 20.00.

**Hvalvíkar kommuna**

## Kunngerð

**Viðvíkjandi fólkatingsvalinum tann 20.11.2001.**

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at atkvøðugreiðslan til fólkatingsvalið týsdagin tann 20. november 2001 verður í gamla skúla.

Atkvøðugreiðslan byrjar kl. 09.00 fyrrapartin og heldur fram til kl. 20.00 og so leingi veljarar møta uttan steðg.

Valkort verða send øllum, ið sambært vallistan hava valrætt í Viðareiðis kommunu.

Valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna. Veljari sum ikki hevur fingið valkort, ella sum fær valkort við villum í, eigur at venda sær til kommunustýrið skjótast gjørligt.

**Brævatkvøður:**
Tey, ið av ymsum orsøkum heldur ynskja at velja við brævatkvøðu á fólkayvirlitinum (kommunuskrivstovuni) ella heima, mugu boða Kommunustýrinum frá.

Seinasti dagur fyri brævatkvøðugreiðslu er leygardagin tann 17. november 2001.

**Viðareiðis kommuna**

NORÐOYA SPARIKASSI

## *Rentubroyting*

Í samband við at danski tjóðbankin tann 8. november lækkaði diskontoina við 0,50%, broytir Norðoya Sparikassi við gildi frá 13. november 2001 rentustigini á inn- og útláni.

Rentustigini á bæði inn- og útláni verða lækkað við upp til 0,50%, tó verður rentan á vanligari konto og fíggjarkonto ikki broytt.

Høvuðsrentustigini eru nú hesi:

| | |
|---|---|
| **Innlán** | |
| Vanlig konto/fíggjarkonto | 0,10% |
| 3 mðr. uppsøgn | 2,50% |
| 12 mðr. uppsøgn | 2,75% |
| 12 mðr. uppsøgn ábyrgdarar | 2,25% |
| Silvakonto | 3,75% |
| Gull 1 | 2,25% |
| Gull 2 | 3,75% |
| Bústaðarkonto *(herav 3% í stuðuli)* | 6,25% |
| Kapitalpensjón *(ongin rentuskattur)* | 4,25% |
| Ábyrgdarapeningur | 3,75% |
| **Útlán** | |
| *Bústaðarlán* | |
| 1. veðrættur serialán | 5,00% |
| 1. veðrættur annuitetslán | 5,25% |
| 2. veðrættur serialán | 7,50% |
| 2. veðrættur annuitetslán | 7,75% |
| *Billán* | |
| 50% útgjald | 6,00% |
| 25% útgjald | 7,00% |
| Brúktir bilar | 8,25% |

Nærri upplýsingar um rentustigini kunnu fáast við at venda sær til sparikassan.

*Ósávegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík*
*Tel: 475000 Fax: 476000 Teldupostur: ns@ns.fo www.ns.fo*

VASTI 457171

## Fólkatingsvalið 2001

Veljarar í Sjóvar kommunu, ið sambært vallógini lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni í vanligari avgreiðslutíð til og við 19. nov. 2001.

Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðið, og sum ynskja at greiða brævatkvøðu heima, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá á tlf. 447158 í seinasta lagi 19. nov. kl. 11.00.

*Strendur, 9. november 2001*

SJÓVAR KOMMUNA

**Sjóvar Kommuna**

## Kursus:
## Personlig udvikling

**Skab positive forandringer i dit liv her og nu!**
**Kursus i personlig udvikling den 3.-4. mars 02.**

Er du parat til forandringer i dit liv? Så er psykolog, forfatter og clairvoyant Marianne Suhr atter på Færøerne med nyt kursus i personlig udvikling.

Kurset henvender sig til alle, som ønsker at ændre sit liv i en mere positiv retning.

På kurset vil du få en praktisk indførelse af bl.a. dybdepsykologi, kreativ visualisering, samt arbejde med virkeliggørelse af dine drømme m.m.

Marianne Suhr vil være på Færøerne fra d. 27. feb.- 5. mars 02. Også mulighed for individuel konsultation.

Nærmere information og tilmelding.

**Tlf. +45 20996140**
**e-mail: mahsuudk@yahoo.com**

## Vælumtóktu merkini

"Reykjavík Collection"
&
"Pernille Utzon"
fáast nú hjá okkum

Stásið
Niels Finsensgøta

## VETRAR-DEKK

Allar støddir av vetrardekkum við ella uttan píkar á goymslu.

Ókeypis ásetan

Ringi og fái meira at vita

pf AUTO-VULK
FO-900 Vágur
Tlf. 373680 - 373660
223380
Fax 374680
VULKANISERING OG BILVERKSTAÐUR

GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

**Til útisetar í Danmark**
**Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað**

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Skjót levering

Sosialurin - 311820

Danstein
Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin www.sosialurin.fo

Sosialurin

Sosialurin
www.sosialurin.fo